

# Statoil-sparingar raka veitarar meint

Jan Müller

01.04.2014 - 13:44

Oljan.fo

Avgerðin hjá Statoil at spara triðingin av útreiðslunum til veitarar fer at raka fyritøkurnar, sum lata felagnum ymsar tænastur.

Sparingarnar hjá Statoil umfata veitarar innan viðlíkahald og uppstigan, og tær fara at fáa álvarsligar avleiðingar fyri alla vinnuna og serstakliga tær størru fyritøkurnar.

Tað halda tey í donsku fyritøkuni Semco Maritime.

Statoil sigur, at teknisk krøv hava skrúvað prísirnar upp, samstundis sum arbeiðsgongdin er vorðin tyngri og krevur støðugt meiri umsiting. Avleiðingin er, at verkætlanir eru vorðnar útreiðslutyngri og meiri tíðarkrevjandi, samstundis sum oljuprísurin er fallin og lønirnar hækkaðar fýra prosent.

-Nú fáa vit avleiðingarnar av hesari gongdini. Hetta var væntandi, og vit hava tikið ávís stig, so vit eru fyrireikað, sigur stjórin í norsku deildini hjá Semco Maritime, Kristian Ravn, við heimasíðuna hjá danska felagnum.

Skarvar Statoil 30 prosent av útreiðslunum til viðlíkahald og uppstigan, svarar tað til á leið tvær mia. norskar krónur.